## Myrdu Hamas-leiðara

Palestinskar keldur vilja vera við, at ísraelskir agentar hava beint fyri einum leiðandi limi í teirri hernaðarligu deildini av Hamas. Talsmaðurin hjá Hamas, Izzat al-Rishq, sigur við tíðindastovurnar, at Mahmoud al-Mabhoud varð myrdur fyri einari góðari viku síðani. Hann hevði búð í Sýrialandi í fleiri ár. Tanmn 19. januar fór hann til Dubai, men har komu ísraelskir agentar fram á hann dagin eftir og myrdu hann, sigur Hamas-talsmaðurin. Ísraelsku myndugleikarnir hava ikki gjørt nakra viðmerking til tíðindini, skrivar Reuters.




## Vilja lesa ókeypis

Fyri nøkrum vikum síðani kunngjørdi New York Times, at frá 1. januar í 2011 skulu fólk rinda fyri at sleppa at lesa blaðið á alnetinum. Eygleiðarar siga, at allur tann amerikanski blaðheimurin bíðar nú eftir, hvat fólk fara at gera, tá skipanin hjá New York Times kemur í gildi. Men teimum nýtist kanska ikki at bíða, tí okkurt amerikanskt blað hevur roynt eina tílíka skipan. Tað var Newsday. Í oktober í fjør byrjaði blaðið at krevja haldaragjald frá sínum lesarum á alnetinum, men úrslitið var, at bara 35 fólk vóru sinnað at rinda fyri at sleppa at lesa blaðið á netinum, skrivar AP.

# Fyrsti flokkur í Kelduni innskrivaður

**Eini 20 børn vórðu í gjár innskrivað í frískúlanum í Kelduni í Skálafirði. Talan er um bæði forskúlabørn og børn til fyrsta flokk. - Hetta er ein visjón hjá samkomuni, sigur Jastrid Høj, talskvinna fyri frískúlan í Kelduni**

INNSKRIVING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Jastrid Høj, talskvinna fyri fríksúlan í Kelduni, staðfestir, at nakað enn skal fáast upp á pláss, áðrenn tað er klárt at byrja í frískúlanum í Kelduni*
*Mynd: Sonja I. Jacobsen*

Hóast seinastu loyvini til forskúlan ikki eru komin upp á pláss til frískúlan í Kelduni, vórðu 20 børn í gjár innskrivað til fyrsta flokk og í forskúlan í frískúlanum í Kelduni.

– Vit arbeiða sum um, at hetta kann vera eitt heilt konsept við forskúla, frítíðarstovu og fyrsta flokki, sigur Jastrid Høj, talskvinna fyri frískúlan í Kelduni.

Um orsøkina til, at tað má vera eitt heilt konsept, sigur Jastrid Høj, at skúlin liggur so avsíðis, at tey eru noydd at hava eitt konsept, har foreldrini kunnu koma við børninunum tíðliga um morgunin og so seinni kunnu koma eftir teimum.

### Ein visjón

Seinastu 10 árini hevur samkoman í Kelduni havt dreymin at seta skúla á stovn í samkomuni.

– Hetta er ein visjón hjá samkomuni, og vit vilja gera nógv fyri at fáa hetta til eitt heildarprojekt. Tað skal nógv til at forða okkum, at hetta kemur ígjøgnum, sigur Jastrid Høj

### Mugu kunna velja

Nógv hava seinastu tíðina sett spurnartekin við, at skúli verður settur á stovn í Kelduni í Skálafirði, og hetta er Jastrid Høj greið yvir, men hon skilir ikki reiðiliga hví.

– Tað verður kanska størri fokus sett á okkum. Eg veit ikki ordiliga hví.

Tveir fríksúlar eru í Havn og ein av teimum, Adventistaskúlin, er kristin.

Men eg haldi, at tað ikki er meira enn natúrligt, at fólk her í økinum fáa eitt alternativ. Tað er ein mannarættur, sambært ST, men ikki í Eysturoynni, metir Jastrid Høj.

# Koma heilt úr Kollafirði

**Hjørdis H. Petersen var í gjár við dótrini, Sitri, tá hon varð innskrivað í skúlan í Kelduni. Familjan er úr Kollafirði og mamman er greið yvir, at tað kann tykjast langt at fara í skúla**

INNSKRIVING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Vit hava ikki ordiliga gjørt av, hvør skal koyra og so framvegis, men børnini í Kollafirði mugu eisini onguntíð við bussinum klokkan hálvgum átta.

Tað sigur Hjørdis H. Petersen, sum í gjár var til innskrivin við dótrini, Sitri.

Men hóast teinurin í skúla er langur, er Hjørdis H. Petersen sannførd um, at valið at koyra Sitri í frískúlan í Kelduni er tað rætta.

– Eg haldi, at tað er ótrúliga gott, at vit kunnu senda hana í ein kristnan frískúla, sum byggir á somu virði, sum vit gera í heiminum hjá okkum, sigur Hjørdis H. Petersen.

### Kapping er góð

Hjørdis H. Petersen metir ikki nakað vera galið við vanliga fólkaskúlanum, men er sannførd um, at kapping er góð.

– Tað er ongin loyna, at vit í parentes kunnu siga, at kapping er góð, sigur Hjørdis Petersen.

Og leggur afturat, hvussu týdningarmikið tað er at hava fleiri alternativir.

### Vóna gott úrslit

Tað verða sambært Hjørdis H. Petersen sjálvandi nakrir trupulleikar at byrja við í skúlanum, men hon ivast heldur ikki í, at børnini í frískúlanum í Kelduni vera á minst sama støði, sum fólkaskúlanæmingar.

– Skúlin verður lítil, og eg trúgvi, at hetta við, at tú hevur menningarætlanir fyri einstaka barnið og tað verður strembað eftir, at tað verður eitt høgt fakligt støði, so eg ivist ikki í, at hesi verða eins væl fyri og tey í fólkaskúlanum, metir Hjørdis H. Petersen.



*Børnini hugnaðu sær óført saman við foreldrum sínum, tá tey vórðu skrivað inn í frískúlan í Kelduni í gjár. Uttast til høgru eru Sitri og Hjørdis H. Petersen*
*Mynd: Sonja I. Jacobsen*